


[www.oljan.fo](http://www.oljan.fo)

**Jan Müller** 04 - 03 - 2013

# Faroe Petroleum borar í Barentshavinum

Faroe Petroleum boðar frá, at nú verður Darwin leitibrunnurin, sum Faroe eigur 12,5% av, boraður. Darwinleitimiðið liggur á Veslemøy Rygginum, á markleiðini í vestara parti Barentshavinum í Noregi, umleið 60-80 km í ein útsynning frá Skrugard og Havis fundunum, sum Statoil gjørdi fyri stuttum. Fleiri leitimið eru eyðmerkt við at nýta 3D seismikk, og hesin brunnurin skal borast á høvuðsmiðinum Darwin, og skal samstundis eisini minka um váðan á hinum leitimiðunum á loyvinum. Repsol Exploration Norge AS (20%) er fyristøðufelag fyri boringina. Aker Barents boripallurin verður nýttur til boringina. Í samlagnum luttaka eisini Talisman Energy (12,5%), Marathon (10%), RWE Dea (15%), Det norske oljeselskap (10%) og Concedo (20%). Felagið fegnast um luttaka í okkara fyrsta brunni í Barentshavinum. Darwin brunnurin er eisini tann fyrsti brunnurin í einari virknari boriætlan í 2013, har millum annað Novus, sum Faroe Petroleum stendur fyri, og tveir brunnar á Butch fundinum, skulu borast á norskum øki.